# enn ikki ringja og biðja kjans

*- Tað kennist sum ein stór ábyrgd, tá ið raksturin er tungur, men vit kunnu ikki gera annað enn okkara besta. Tað er sjálvandi eisini troyttandi at vera í andglettinum so støðugt, sum rækjuflotin hevur verið tað, sigur Pauli Justinussen, skipari á rækjutrolaranum, Napoleon*



um um várið. Men um túrurin varar í ein mánaða, verður hetta ikki ein vánaligur túrur kortini.

Vanliga eru 16 mans við Napoleon, men nú teir fóru til Eysturgrønlands, vóru 18 mans umborð.

- Á túrinum undir Eysturgrønlandi pakka vit so nógvar rækjur, sum vit náa í eitt kilo eskjur, sum fara til Japans. Hesar verða skildar í ymiskar støddir og verða pakkaðar ráar. Nógv arbeiði er av hesum, og tí eru vit tveir mans fleiri við hendan túrin.

Hann sigur, at rækjurnar eru skjótari at selja, tá ið tær eru pakkaðar soleiðis, og tað eru bara grønlandsrækjurnar, sum verða pakkaðar í eitt kilo eskjur.

- Men hetta er ikki nøkur nýggj framleiðsla, tí hendan linjan stóð umborð á skipinum, tá ið tað kom í 1989.

## Svalbard aftur vorðið áhugavert

Tað eru fleiri ár síðan, at Napoleon, sum er fyrrverandi Ocean Castle, royndi á leiðunum við Svalbard, men sum skilst á skiparanum, eru hesar leiðir aftur vorðnar meira áhugaverdar, nú rækjurnar á Flemmish Kap eru so smáar, og skipini stundum hava havt hampiliga góðan fiskiskap við Svalbard.

Hann sigur, at Havborg fiskaði í fleiri mánaðir við Svalbard í seinasta ári, og Kappin er eisini við Svalbard.

- Sum eg havi skilt, hevur tað bara gingið rímiliga væl hjá føroysku rækjutrolarunum har uppi.

Høgifossur, sum er triði rækjutrolarin, eru antin á Flemmish Kap ella á Grand Bank í løtuni.

Pauli sigur, at verður hesin túrurin hjá Napoleon í Eysturgrønlandi ikki alt ov drúgvur, ætla teir sær beinleiðis upp til Svalbard at royna.

- Vit ætla okkum upp hagar at fylla upp í lastina, sum hann tekur til.

Hann viðgongur, at hann er spentur upp á at royna hesar leiðir.

- Soleiðis, sum vit hava skilt gongdina við Svalbard, seta vit í løtuni størri vónir til Svalbardsleiðirnar enn til Flemmish Kap.

Pauli sigur, at rækjurnar, sum skipini hava fingið við Svalbard, eru bæði stórar og smáar – og tær eru ógvuliga reyðar í litinum, sum dámar summum keyparum væl.

## Hampilig inntøka

Sum nevnt, hevur Pauli Justinussen siglt sum skipari við Napoleon í hálvt triðja ár.

Hann sigur, at hóast rækjuvinnan hevur verið nógv í andglettinum seinastu árini, eru nógvir av monnunum framvegis teir somu, sum tá ið hann kom umborð.

- Tað er lítil útskifting í manningini, og serliga síðan ísfiskavinnan í Føroyum fór at geva minni av sær, er næstan ikki dagur, at menn ringja og vilja sleppa við. Men vit mugu tívverri – ella kanska tíbetur – siga, at vit eru mannaðir, sigur hann.

Pauli sigur, at hóast rækjuvinnan hevur ligið lágt seinastu árini, so hevur manningin kortini fingið eina hampiliga ársinntøku, og soleiðis var eisini seinasta ár.

- Vit hava so ligið oman fyri minstulønina, leggur hann aftrat.

## Stór ábyrgd

Vit spurdu at enda skiparan, hvussu tað kennist at hava ábyrgdina umborð á einum skipi í tí partinum av flotanum, ið er so nógv frammi, sum rækjuflotin hevur verið seinastu árini.

- Í fyrsta lagi kennist tað, sum ein stór ábyrgd, tá raksturin er tungur, men vit kunnu ikki gera annað enn okkara besta. Tað er sjálvandi eisini troyttandi at vera í andglettinum so støðugt, sum rækjuflotin hevur verið tað, sigur Pauli Justinussen at enda.

Stýrimaður umborð á Napoleon hendan túrin er Jens Jacobsen, sum býr í Hoyvík.



*Napoleon er nú á veg til Eysturgrønlands, har ein stórur partur av rækjunum verða pakkaðar í eitt kilo eskjur, sum fara til Japans. Hendan túrin eru 18 mans við í mun til teir 16, sum talið vanliga er*